# Sersáttmáli

## millum
## Føroya Arbeiðarafelag/Havnar Arbeiðskvinnufelag
## og
## Føroya Arbeiðsgevarafelag

## fyri arbeiði á hotellum, gistingarhúsum, matstovum v.m.

## Galdandi frá 1. maj 1999 – 1. ma1 2001

**Tórshavn 11. maj 1999**

# Sersáttmáli
# millum
# Føroya Arbeiðarafelag og
# Føroya Arbeiðsgevarafelag
# fyri arbeiði á hotellum, gistingarhúsum, matstovum v.m.

**§ 1.**

**Sáttmálaøki.**

Hesin sáttmáli fevnir um alt arbeiði innan sáttmála- og serarbeiðaraøki á hotellum, gistingarhúsum, matstovum.

Sáttmálin fevnir tó ikki um fólk í leiðandi starvi ella fólk, hvørs støða hjá arbeiðsgevaranum er av tílíkum slagi, at hon hevur rætt til at disponera í stóran mun bindandi fyri arbeiðsgevara. Hetta er bert galdandi fyri eitt fólk á hvørjum arbeiðsplássi.

**§ 2.**

**Arbeiðstíð.**

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna sambært arbeiðsætlan, sum løgd verður fyri 4 vikur í senn. Arbeiðsfólkið skal hava arbeiðsætlanina í seinasta lagi 7 dagar áðrenn hon kemur í gildi.

**§ 3.**

**Løn.**

Lønin er tann til eina og hvørja tíð ásetta løn til fastløntar arbeiðarar um mánaðin fyri vanligt arbeiði 40 tíma viku sambært høvuðssáttmálan millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Fyri arbeiði innan fyri arbeiðsætlanina verður latnar hesar viðbøtur:

| | | | |
|---|---|---|---|
| - mánadag til fríggjadag millum kl. 21.00 og 24.00 | kr. | 2,50 | pr. tíma |
| - mánadag til leygardag millum kl. 00.00 og 07.00 | kr. | 7,50 | pr. tíma |
| - leygardag millum kl. 07.00 og 24.00 | kr. | 5,00 | pr. tíma |
| - sunnudag millum kl. 00.00 og 07.00 | kr. | 10,00 | pr. tíma |
| - sunnudag millum kl. 07.00 og 24.00 | kr. | 7,50 | pr. tíma |
| - halgidagar, 1. mai, flaggdagin, páskaaftan, hvítusunnuaftan, grundlógardag, 1. november, jólaaftan, ólavsøkuaftan, ólavsøkudag | kr. | 10,00 | pr. tíma |

Fyri  tímalønt arbeiði fyri 8-tíma dag millum kl. 08.00 og 17.00 verður tímalønin 173,33 av frammanfyri nevndu føstu mánaðarløn. Yvirtíð verður goldin sambært ásetingini í høvuðssáttmálanum.

Fólk við fastari lutvísari vikuligari arbeiðstíð verða at løna eftir somu reglum sum fólk við fullari viku, tó soleiðis at lønin verður roknað lutfalsliga í mun til 40 tíma viku.

Ungfólk 14 ár fáa 50%, 15 og 16 fáa 75% av vaksnamannalønini bæði fyri normal- og yvirtíð.

**§ 4.**

**Arbeiði uttan fyri vaktarskipanina.**

Verður arbeitt uttan fyri tíðir, sum ásettar eru í arbeiðsætlanini, verður hetta arbeiði lønt við vanligari tímaløn umframt hesum viðbótum:

| | | | |
|---|---|---|---|
| - mánadag til fríggjadag millum kl. 17.00 og 21.00 | kr. | 5,00 | pr. tíma |
| - mánadag til fríggjadag millum kl. 21,00 og 08.00 | kr. | 15,00 | pr. tíma |
| - leygardag millum kl. 08.00 og 12.00 | kr. | 5,00 | pr. tíma |
| - leygardag millum kl. 12.00 og 24.00 | kr. | 15,00 | pr. tíma |
| - sunnudag og halgidagar | kr. | 15,00 | pr. tíma |
| - 1. mai, flaggdagin, páskaaftan, hvítusunnuaftan, grundlógardag, 1. november, jólaaftan, ólavsøkuaftan, ólavsøkudag | kr. | 15,00 | pr. tíma |

Úrtíðarløn kann, um arbeiðsfólk ynskir tað, og arbeiðsgevarin samtykkir, avspákast í sama lutfalli, sum úrtíðartaksturin í mun til vanligu lønina.

Arbeiðsgevarin tekur nærri avgerð um, nær avspákingin skal vera, og boðar frá hesum í góðari tíð, tvs. vanliga ikki seinni enn 4 dagar frammanundan.

Avspákingin skal vera í heilum ella hálvum døgum og skal vera av í seinasta lagi tveir mánaðir aftaná, at viðkomandi úrtíðararbeiði er útint. Tílík avspáking skal ikki leggjast á dagar, sum frammanundan eru frídagar.
Hjálparfólk til veitslur og tílíkt fáa vanliga tímaløn sambært høvuðssáttmálanum.

**§ 5.**

**Útgjaldingardagur.**

Lønin hjá mánaðarløntum verður útgoldin seinast í mánaðinum og skal vera avgreidd í seinasta lagi 25. í mánaðinum. Lønin hjá tímaløntum fellur til gjaldingar eina ferð um vikuna.

**§ 6.**

**Broytingar av lønum.**

Verða lønirnar í høvuðssáttmálanum og fastlønarsáttmálanum broyttir, so verða lønirnar í hesum sáttmala broyttar samsvarandi, burtursæð frá har hesin sáttmáli hevur serstakar ásetingar fyri yvirtíð og fyri arbeiði í vaktarskipanum.

**§ 7.**

**Frítíð og frítíðatrløn.**

Frítíð og frítíðarløn verða latin samsvarandi galdandi frítíðarlóg.

**§ 8.**

**Álitismannaskipan.**

Viðvíkjandi álitismannaskipan, so verður víst til álitismannaskipanina í høvuðssáttmálanum millum feløgini.

**§ 9.**

**Uppsagnarfreistir.**

Fyri fastlønt verða uppsagnarfreistirnar í fastlønarsáttmálanum galdandi.

Fyri tímalønt verða uppsagnarfreistirnar í høvuðssáttmálanum galdandi.

**§ 10.**

**Gerðarættur.**

Viðvíkjandi ósemju um arbeiði, sum ikki er tilskilað í sáttmálanum, og trætur um rætta fatan av sáttmálanum verður víst til høvuðssáttmálan hjá feløgunum.i

**§ 11.**

**Prosentgjøld.**

Arbeiðsgevarin rindar tey prosentgjøld, limagjøld og eftirlønargjøld sum ásett eru í høvuðssáttmálanum hjá felaganum, og eftir skipanini sum ásett er í nevnda sáttmála.

**§ 12.**

**Aðrar ásetingar.**

Har annað ikki er nevnt í hesum sáttmála verða galdandi ásetingarnar í høvuðs- sáttmálanum hjá pørtunum, tó ikki ásetingarnar um arbeiðstíð og løn, har hesin sáttmáli ikki vísir til ásetingarnar um løn í høvuðssáttmálanum.

**§ 13.**

**Gildiskoma og uppsøgn.**

Sáttmálin er galdandi frá 1. mai 1999, og kann sigast upp við 2 mánaða freist til ein 1. mai, tó í fyrsta lagi til 1. mai ár 2001.

**§ 14.**

**Sáttmálaeintøk.**

Hesin sáttmáli verður undirskrivaður í trimum einsljóðandi eintøkum.

Tórshavn, 5. juni 2003

**Føroya Arbeiðarafelag**

Ingeborg Vinther
Elias Hansen
Marius Clementsen
Kári Jacobsen
Georg Hansen
Símun Abrahamsen
Tana Kallsoy

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Vilhelm M. Johannesen
Kristoffur Laksá
Gudmund Mortensen
Bergur Poulsen
Magni Arge
Leivur Mikkelsen
Jóhan Páll Joensen